

*Í hesum húsinum skrivaði Beethoven Heiligenstadt-testamentið*

vón um betring, og at enda tvungin til at síggja eina varandi neyðarsligheit í eyguni (ein neyðarsligheit, sum kanska tekur ár at lekja, um tað yvirhøvur er gjørligt). Føddur við eldsál, livandi sinni og opin fyri skemti og veitslulívi noyddist eg longu tíðliga í mínum lívi at liva fyri meg sjálvan og í einsemi. Og um eg onkuntíð vildi seta meg ímóti hesum, áh, hvusssu hart varð eg ikki avvístur vegna mína vánaligu hoyrnu, og hóast hetta var eg ikki førur fyri at siga við fólk: Tosið harðari, rópið, tí eg eri deyvur! Áh, hvussu skuldi eg viðganga, at sansurin sveik, sum hjá mær skuldi verið meira fullkomin enn hjá øðrum, ein sansur, sum eg eina ferð átti í so ríkiligum máti, so ríkan, sum tað bert er unnað teimum fáu. Nei, eg kann tað ikki. Fyrigevið mær tessvegna, tá ið tit síggja, at eg víki undan, har eg so fegin vildi møtt tykkum. Dupult ónt voldar mín ólukka mær, tí at hon eisini má gera meg undirmettan. Gleðina um samveru við gevandi, mennandi og hugvekjandi samrøðum er nakað, eg má liva fyriuttan. Eg eri næstan heilt einsamallur. Bara tá tann beiska noyðslan krevur tað, tori eg at vera saman við fólki. Sum eitt burturvíst má eg liva. Komi eg nær fólki, gerist eg nervøsur og bangin, at mín standur verður uppdagaður. – Soleiðis hevur tað eisini verið tað hálva árið, eg havi verið her í Heiligenstadt. Mín skilagóði lækni hevur rátt mær til at eira míni oyru í so stóran mun sum gjørligt, og hann gongur sostatt míni hugsan á møti. Hóast hetta kann eg ikki lata vera við onkuntíð at vera saman við fólki. Men denn eyðmíkt, tá onkur undir mínari lið hoyrdi eina floytu langt burturi, og eg einki hoyrdi. Ella tá onkur annar lurtaði eftir ástarsangi, meðan eg einki hoyrdi... Slíkt fær meg at fella í vónloysi, og tankin at taka mítt egna lív er ikki fjarur. Bert eitt, listin, helt meg frá hesum. Huff, eg helt tað var ógjørligt at fara úr verðini, áðrenn eg hevði fullført alt tað, eg føldi meg kallaðan at avrika, og so hóraði eg framhaldandi hetta vesaliga lívið – ja, sanniliga vesaligt við einum likami so ovurviðkvæmt, at ein evarska lítil broyting kundi tveitt meg frá eydnusamastu kenslu niður í svartasta vónloysi.

Tolsemi, soleiðis ljóðar tað, má eg nú velja til mína leiðarastjørnu. Tað havi eg gjørt. Eg vóni, at mín avgerð um at halda út vil vara við. Til tað hugar teirri strongu lagnugudinnuni at kuta mín lívstráð. Kanska fer tað at gangast mær betri – kanska ikki; eg taki tað, sum tað kemur. Longu í mínum 28. ári var eg noyddur at vera filosoffur, tað er ikki lætt, - hjá einum kunstnara er tað tyngri enn hjá nøkrum øðrum.

Guddómur, tú sum sært inn í meg, tú veitst eisini hetta; tú veitst, at tað rúmar mannakærleika og trongd til at fremja góðar gerðir. Áh, menniskju, tá ið tit eina ferð lesa hetta, síggið tá, at tit hava gjørt mær órætt; onkur av tykkum, sum er ólukkuligur, vil ugga seg við tankan um at hava funnið ein av sínum líkamonnum, ein, sum við øllum forðingum, náttúran hevur lagt á hansara leið, tó hevur gjørt alt, sum stóð í hansara makt, fyri at verða tikin í røðina av virðiligum kunstnarum og menniskjum.

Til mínar brøður, Karl og Johann, tá eg eri deyður, og um Schmidt, professari, enn er á lívi, biðið so hann frá mær um at greiða frá mínari sjúku. Og tað, eg her skrivi, skulu tit leggja saman við mínari sjúkrasøgu, til tess at heimurin kann, í tað minsta eftir mín deyða so vítt sum hetta er gjørligt, sættast við meg.. – Samstundis innseti eg tykkum sum arvingar til tað sindrið, sum er av jørðiskum góðsi (um man kann brúka eitt slíkt heiti). Býtið hetta ærliga og siðiliga millum tykkum og verið vinir og hjálpsamir hvør móti øðrum. Hvat tit hava gjørt móti mær, tað vita tit, er langt síðani fyrigivið. Tær, Karl bróður, vil eg serliga takka fyri tann kærleika og trúskap, tú hevur víst mær ta seinastu tíðina. Tað er mítt ynski, at tykkum verður unt eitt betri og meira sorgleyst lív enn mítt.

Lær tykkara børn, at einans viljin til tað góða kann skapa eydnu, ikki peningur. Eg tosi av erfaring. Tað var viljin til tað góða, sum helt mær uppi, sjálvt í neyðini. Næst eftir mín kunst er tað hesin viljin, eg kann takka fyri, at eg ikki endaði mítt lív við sjálvmorði. – Livið væl og elskið hvønn annan. Eg takki øllum mínum vinum, serliga Lichnowsky, fúrsta og Schmidt, professara. – Musikkinstrumentini frá Lichnowsky, fúrsta ynski eg skulu goymast hjá tykkum. Men so skjótt tey ikki eru tykkum til nakra nyttu, so seljið tey bara. Tað vildi glett meg at kunna verið tykkum til nyttu sjálvt í mínari grøv!

Lat alt ske soleiðis. – Við gleði gangi eg deyðanum á møti. Kemur hann, áðrenn eg havi fingið møguleikan at royna mínar listargávur til fulnar, so kemur hann, hóast mína hørðu lagnu, kortini ov tíðliga, og eg vildi tá ætlandi ynskt, at hann kom seinri. – Men um so verður, eri eg nøgdur: Loysir hann meg ikki tá úr einari markleysari líðingar-tilveru? – Kom tá tú vilt, eg gangi tær djarvur á møti.

Livi væl og gloymi meg ikki heilt, tá eg eri deyður... Eg havi tað uppiborið av tykkum, - eg, sum so ofta í mínum lívi havi hugsað mær at gjørt tykkum eydnusamar; veri tað!

**Eftirskrift:**

Tann lítla vónin, eg hevði, um í minsta lagi so dánt at verði heilsugrøddur, má eg nú uppgeva. Sum bløðini følna á heysti, er tað nú eisini gingið við hesum…. Áh, forsjón, lat eina ferð ein ljósan gleðisdag upprenna fyri mær. So alt ov leingi hevur tað innarliga afturljóðið av sannari gleði verið mær fremmant. Nær, puff nær, áh guddómur, skal eg aftur kunna møta henni í náttúrunar og menniskjunar templi? Ongantíð? – Nei, tað vildi verið ov hart!"

o-O-o

1808 var deyvleikin so framkomin, at Beethoven trupult kundi luttaka í vanligum samrøðum. Seks ár seinri var hann noyddur at gevast sum tann gudaborni pianistur, hann var, og hann kundi heldur ikki hoyra tað, ið fólk róptu til hannsara. Í 1818-1820 varð hann stokkdeyvur.

Tá ið tann ódoyggiliga 9. symfoniin á fyrsta sinni varð framførd tann 7. maj 1824 í Wien, stóð Beethoven á pallinum við síðina av dirigentinum. Hann var sum sagt stokkdeyvur, hoyrdi einki. Hann varð tá so væl móttikin og heiðraður, at politiið noyddist at leggja uppí, fyri at fáa ró í sjónleikarhúsinum.

Um hesa 9. symfoniina skrivaðu bløðini m.a.: "Beethovens genius (verndarandi) vísti seg aftur í hesi stórfingnu, gigantisku kompositión heilt í síni ungdóms originalu magi og megi…..sum avdúkaði ein nýggjan heim í tí heilagu listini."

Á originalpartituríð til opningssatsin til ta veldugu messuna *Missa solemnis* skrivaði Beethoven: *"Von Hertzen – möge es wiede zu Hertze gehen."* Tað tók honum fleiri ár at gera hesa miklu messu fyri soli, kór, orgul og orkestur lidna, men tá hon so varð framførd í 1823, hoyrdi hann einki. Stokkdeyvur. Verkið er so stórt og krevjandi, at í meira enn 100 ár varð messan bert framførd í koncerthøllum, áðrenn hon kom í kirkjuumhvørvi, sum hon upprunaliga var ætlað .

Heystið 1826 gjørdist Beethoven álvarsliga sjúkur ætlandi av lungnabruna og av einari sjúku, sum var ókend tá í tíðini, men í dag verður hildið, at sjúkan skorpulivur tók lívið av Beethoven, hóast hann als ikki var alkoholikari. – Niðurundirkomin sálarliga og likamliga man vera tann sanna orsøkin til deyða hansara. Januar 1827 var hann tó so mikið væl fyri, at hann kundi fara undir arbeiðið, sum hevði ligið á láni: ein fýrhent klaversonata, oratoriið *Saul og David* o.a..

Men tíanverri, batingin varð ikki drúgv. 24. mars á morgni sama árið varð honum veitt altarsins sakramenti. Vinir hansara vóru hjástaddir. Tá ið bírættingin var liðug, segði hann døsin: "Plaudite, amici, comoedia finita est" (Klappið, vinir, komedian er liðug). Løtu seinni kom ein kassi av víni frá einum góðum vini. Beethoven skeitti á kassan og segði: "Tíverri, - ov seint, harmiligt, harmiligt." Hetta vóru hansara seinastu orð.

Seinrapartin 26. mars 1827 var ein bróðurkona Beethovens og ein vinmaður Schuberts einsamøll saman við tí doyggjandi Beethoven. Brádliga kom eitt snarljós, sum lýsti kamarið, har hann lág, og so gekk toran. Beethoven opnaði eyguni, lyfti sína høgru hond og knýtti nevan; lyfti so høvdið eitt sindur, andlitið var álvarsligt og hóttandi. Løtu seinri var hann deyður.

Jarðarferðin var tann største, fólk vistu um, eini 20.000 fólk fylgdu Beethoven til jarðar.

Hann doyði 56 ára gamal – tá vorðin ódoyggiligur!

Heiðursborgari i Wien varð hann gjørdur 1815.

Í Elysium – har tey ódoyggiligu dvølja – ljómar fagnaðarsangur og fagnaðartónar í Níggjundi symfoni: *Freude! Seid umschlungen, Millionen! Über Sternen muss er whonen!*

**Keldur:**
Musikkens Verden 1964.
Robin May, Beethoven.
Fotokopi av *Heiligenstadt-testamentinum* fingið
við vælvild frá Arna Andreasen, musikari og keypmaður.